# Tað almenna má ganga á odda

**Stjórin í Kall, Bjarni Askham Bjarnason, heldur tað verða neyðugt, at tað almenna gongur á odda, um vit skulu hava eina veruliga KT-vinnu í Føroyum**




*Stjórin í Kall, Bjarni Askham Bjarnason, heldur tað verða neyðugt, at tað almenna gongur á odda, tá ið tað ræður um at fáa eina veruliga KT-vinnu í gongd í Føroyum*

**KT-VINNA**
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum nevnt aðrastaðnis í blaðnum hevur Føroya Tele havt eina risavøkstur innan breiðbandsútbreiðsluna seinastu mánaðirnar. Harðasti kappingarneytin hjá Føroya Tele er Kall, og hjá teimum er støðan júst tann sama.

### Størst vøkstur innan privatkundar

Bjarni Askham Bjarnason, stjóri í Kall, sigur, at vøksturin hjá teimum líkist tí hjá Føroya Tele í prosentum og kanska væl tað.

- Vit hava havt ein øgiligan vøkstur á breiðbandsøkinum, og tað er serliga á tí privata marknaðinum, at vøksturin er stórur, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

Stjórin í Kall sigur, at tað serliga eru tey bíligaru breiðbandshaldini, ið eru nógv umbiðin, men nakað verður eisini spurt eftir teimum størru.

### Onkur má ganga á odda

Aðrastaðnis í blaðnum førir Richard Mortensen, stjóri í FT Samskifti, fram, at tað er neyðugt við einum veruligum KT-umhvørvi í Føroyum, um vit skulu fáa eina veruliga KT-vinnu í gongd her á landi, og hesum er Bjarni Askham Bjarnason samdur í.

- Útbjóðararnir eru ikki nøkur forðing fyri menningini av eini KT-vinnu, men onkur má ganga á odda og skapa karmarnar. Her haldi eg, at tað hevði verið púra náttúrligt, at tað var tað almenna, sum gjørdi tað. Tá hugsi eg bæði um reint handilsliga, men eisini hvat viðvíkur útbúgving og øðrum, sum skal til, um vit skulu fáa eina veruliga KT-vinnu, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

## Samskip hækkar oljuavgjaldið

Teir høgu – og støðugt høgu – oljuprísirnir fáa nú eisini avleiðingar fyri viðskiftafólkini hjá flutningsfelagnum Samskip.

Felagið hevur fyri løtu síðani sent út eitt skriv til viðskiftafólk síni, har greitt verður frá, at felagið sær seg noytt til at hækka oljuavgjaldið.

Oljuavgjaldið fer at hækka úr 12 upp í 16%. Henda hækkingin kemur í gildið 1. Desember.

Sagt verður, at oljuavgjaldið verður roknað av sjófrakt og av koyring í Føroyum.

